# Julian við í oddastríðnum

**Við einum 1-0 sigri á IBV í Vestmannaoyggjum leygardagin syrgdu Julian Johnsson og liðfelagar hansara í IA fyri, at teir framvegis eru við í oddastríðnum. Hitt "føroyska" liðið í Íslandi, Fram, spældi týskvøldið javnt 0-0 ímóti Víkingi**

ÍSLAND
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Føroyski landsliðsleikarin Julian Johnsson og liðfelagar hansara í IA eru framvegis væl við í oddastríðnum í íslendsku kappingini eftir sigurin á IBV leygardagin*

Áðrenn íslendska fótbóltskappingin fór av bakkastokki í ár, vóru tað mong, ið mettu liðið hjá føroyska landsliðsleikaranum Julian Johnsson, ÍA, sum eitt av bestu boðunum upp á ein møguligan íslendskan meistara. Nú íslendska kappingin er gott og væl hálvrunnin, liggur ÍA á triðjaplássi, og einans trý stig eru upp til oddaliðið Fylkir.

### Sigurin tryggjaður í evstu løtu

Sum sagt vóru Julian og liðfelagar hansara á vitjan hjá ÍBV í Vestmannaoyggjunum leygardagin, og tá ið avtornaði eydnaðist tað ÍA at fáa øll trý stigini við sær aftur til Akranesar.

Talan var um ein javnan dyst sambært íslendskum miðlum, men ÍA var við yvirlutan í fyrra hálvleiki. Sigurin hjá Julian og teimum var tó ikki tryggjaður fyrr enn í evstu løtu. Málið hjá ÍA kom í 88. minutti, tá ið ein verjuleikari hjá IBV var dømdur fyri at hava tikið hondina til hjálpar. Eyjamenn vóru stak ónøgdir við dómin, men dómarin lat ikki við seg koma, og tí kundi Hjørtur Hjartason gera sigursmálið fyri Julian Johnsson og liðfelagar hansara. ÍA er nú væl við í kappingini um íslendska meistaraheitið, men tað er ein vansi fyri teir, at teir ongan dyst hava eftir ímóti oddaliðnum Fylkir.

### Fram fekk stig

Mikukvøldið leikti liðið hjá Hans Fróða Hansen og Fróða Benjaminsen, Fram, á útivølli ímóti Víkingi. Her eydnaðist tað liðnum hjá teimum báðum føroysku landsliðsleikarunum at fáa ein málleysan javnleik og harvið tað eina stigið. Fram eru tó framvegis botnlið, og tað er eitt petti upp til næstaaftasta liðið. Sum skilst á íslendsku fjølmiðlunum var talan um eitt gott avrik hjá Fram, har liðið vísti sera góðan stríðsvilja og við eitt sindur av hepni kundi havt ognað sær sigurin.

Íslendska felagið Fram, har Hans Fróði Hansen og Fróði Benjaminssen spæla, hevur fingið nýggjan venjara, eftir at Ion Geolgau segði seg úr starvinum. Tað verður Ólafur Kristjansson, sum nógvu seinnu árini hevur spælt og verið venjari í danska felagnum AGF. Hann gavst í AGF í summar, og nú hevur hann játtað at taka við starvinum í Fram, sum liggur á einum niðurflytingarplássi í bestu íslendsku deildini.

Nú er bólturin, sum David Beckham sendi langt víð síðuna av málinum í brotsparkskappingini ímóti Portugal í EM, til sølu. 25 ára gamli Pablo Carral, sum stóð aftan fyri málið, loftaði bóltinum og tók hann við sær heim. Nú hevur hann sett bóltin til sølu á eini uppboðssølu á internetinum, og higartil er boðið komið upp á 70.000 krónur fyri bóltin. Roknað verður við, at fleiri boð fara at koma.

Hollendska fótbóltslegendan Johan Cruyff mælir hollendska fótbóltssambandinum til at seta Marco van Basten sum nýggjan landsliðsvenjara. Cruyff, sum plagar at hava eina viðmerking um tað besta, heldur, at van Basten er rætti maðurin til starvið, og at hann skal hava John van't Schip sum hjálparvenjara. Hesir báðir vunnu Europameistaraskapið við Hollandi í 1988.

Amerikanski tennisspælarin Andre Agassi hevur nú vunnið sín dyst nummar 800 í ATP-kappingini. Hetta hendi í gjár, tá ið Agassi vann á landsmaninum Alex Bogomolov. Andre Agassi er tann sætti spælari í ATP-søguni, sum klárar at vinna 800 dystir.

# Súkklurnar farnar á rull

**Í gjár var farið undir árligu Statoil kring Føroyar kappingina, og súkklað verður fram til sunnudagin, tá ið vinnarin verður funnin. Sum nakað nýtt verður eisini ein fjallakapping í ár.**

SÚKKLUKAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Árliga súkklukappingin Statoil kring Føroyar fór á rull í gjár, tá ið súkklararnir súkklaðu ein prolog, sum tað eitur, ið var ein einkultstartur, har súkklað var í Klaksvík. Í dag verður súkklað í Eysturoynni, og er talan um ein av longru teinunum upp á góðar 100 kilometrar.

### Sandingar fáa vitjan

Í morgin verður súkklað á Sandoy, og tá er talan um ein einkultstart upp á 27 kilometrar. Her verður høvi hjá tí lokala favorittinum, Sverra Mohr Edvinsson, ið er ein av okkara royndastu súkklarum, at vísa sínar dygdir.

Leygardagin verður súkklað í Suðuroy, og her skulu súkklararnir veruliga royna seg, tí at tá eru onkrar rættuliga strævnar brekkur, sum bíða teimum. Seinasti súkkludagurin er sunnudagurin, tá ið kappingin verður avgjørd. Tá verður byrjað í Tjørnuvík, og málið verður sum vant við Statoil-støðina í Gundadali.

### Eisini fjallakapping

Hetta er níggjunda árið, at Statoil kring Føroyar er á skránni. Fyrsta almenna kappingin var í 1997, og øll árini hevur Statoil verið høvuðsstuðul. Samlaða longdin, ið súkklararnir skulu leggja aftur um bak, er 348 kilometar, og tað er 18 kilometrar fleiri enn í fjør.

Í kappingini í ár verða 22 luttakarar, og teir umboða trý lond, Føroyar, Ísland og Danmark. Elsti luttakarin er 42 ár, og tann yngsti er 15 ár.

Sum nakað nýtt verður skipað fyri eini sonevndar fjallakapping, har teir, sum koma fyrst um skorini, fáa stig í fjallakappingini. Tann, ið hevur flest stig, sleppur so at súkkla í einari serliga fjallatroyggju, sum vit eisini kenna tað frá altjóða kappingum.




SKEMMAN

## Søkir handilslærling

Gerst handilslærlingur hjá okkum og fáa nógvar fyrimunir!

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estland. Ì hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 500 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byjra?**
Lærlingurin skal byrja 1 Septembur.

**Hevur hetta tín áhuga:**
**Send so eina skrivliga umsókn innan 24 Juli til:**

SKEMMAN
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
Tel.315588
Mail: skemman@skemman.fo

SKEMMAN

## Søkir skrivstovulærling

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi at byrja 1. september 2004.

**Vit bjóða:**
Eitt skiftandi og spennandi arbeiðið, har tú fært ábyrd fyri egnum øki.
Løn sambært galdandi sáttmála við S & K.

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Ì Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estonia. Ì hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 500 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram á Føroya Handilsskúla.

**Krøv:**
Fyri at gerast skrivstovulærlingur í Skemmuni krevst at tú hevur FHS- ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byjra?**
Tú skalt byrja 1. september 2004.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn innan 24. juli til:

SKEMMAN
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
Tel.315588
Mail: skemman@skemman.fo

Starv

## í bókhaldinum á Føroya Gjaldstovu

Í sambandi við verkætlan, ið umfatar scanning av fakturum, verður eitt starv í bókhaldinum á gjaldstovuni leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
- scanning av fakturum
- skráseting av kreditorum,
- skráseting av útlendskum gjaldoyra,
- skráseting av afturvendandi rokningum,
- skráseting í høvuðsbókhaldi,
- avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar,
- vegleiða stovnar í ymsum fyrispurningum,
- leita fram skjøl og arkivera.

Viðkomandi kann verða settur til onnur arbeiði innan roknskaparhaldið, um leiðslan metir hetta verða neyðugt.

**Krøv til starvið:**
Hægri handilsskúli e.t. og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at viðkomandi skilir væl bókhald, hevur góðan ordan í sínum arbeiði og hevur lætt við at hava yvirlit. Arbeiðið á stovninum er í stóran mun skipað í bólkum. Tí skal tann, ið settur verður, hava góð samstarvsevni og gera sítt til, at bólkurin arbeiðir væl saman.

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna, og starvið eru lønt samb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í Bólki II. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Augustinussen, sum er at hitta á tlf. 352460 ella 214960.

**Umsókn:**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 27. juli 2004.

---

*Á Gjaldstovuni starvast 30 fólk. Gjaldstovan rekur, viðlíkaheldur og mennir Búskaparskipan landsins. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld lankskassans.*
*Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum.*

Sosialurin




Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

Frá Salong Fríðbjørg

Vegna summarfrí er frisørsalongin stongd frá 24/7-17/8.

**Salong Fríðbjørg**
Tlf. 213185 og 422585

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg